# I AM misti oddasessin



*I AM hevur nú mist fremsta plássið á 15 teimum bestu til Shaggy, sum er fyrsti útlendingur, sum er ovast á listanum í 15 vikur*

**Fyri fyrstu ferð í 15 vikur er ein útlendskur tónleikari ovast á 15 teimum bestu. All That Rain heldur fast við støðuna í oddanum**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Um vikuskiftið datt gospelbólkurin I AM av ovastu rók á 15 teimum bestu.

Vakri sangurin, Friðsæla Stund, var í fýra vikur best dámdi sangurin á listanum, men hesa vikuna er I AM farið tvey pláss niður á listanum.

Nú er ein útlendingur fyri fyrstu ferð í 15 vikur ovast á hitlistanum hjá Útvarpinum. Tað er nógv spældi sangurin Angel hjá Shaggy, sum hevur sett seg á ovasta plássið.

All That Rain hevur leingi havt sangin Happy When You´re Gone á listanum, og hesin sangurin liggur hesa vikuna á næstfremsta plássinum. Farnu vikurnar hevur hesin sangurin ligið nummar 4, men er hesa vikuna farin tvey pláss fram.

Ormurin Langi hjá Týr, sum hevur verið drúgvasti sangurin á listanum í ár, er nú farin aftur til pláss nummar 11.

# Almenna valdsapparatið vanvirðir fólkamentanina

**Tey, sum góvu vanliga gerandisføroyinginum tónleikin á føroyskum, verða fullkomiliga vanvird ella tagd burtur av etableraðu garduni av almennum føroyskum andspávum, heldur Óla Jákup Rólantsson, programleiðari á Rás 2**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*



*Tað, sum er vorðið fjøldini av Føroya fólki kærasta ognin, telir ikki sum mentan, heldur Óla Jákup Rólantsson*

Óla Jákup Rólantsson, programleiðari á Rás 2, hevði í Fregnum farna fríggjadagin ein bersøgna grein um tað, hann kallar vanvirðing av vanligu fólkamentanini.

Hann heldur, at alment stuðlaða mentanarlívið útilokar vanliga fólkamentan frá sínum tiltøkum.

- Vit hámeta gomlu kvæðini, eisini tey málsiga bronglutu, veiku og minni væl smíðaðu, enntá tey gøtudonsku. Vit hámeta sálmaskaldskapin - enntá Kingo - og gomlu rímsmiðirnar, sum yrktu upp á akkord, hóast føroyskt mál ikki var til. Men so steðgar forstáilsi, heldur Óla Jákup Rólantsson.

- Partur av mentanini, sum í nýggjari tíð gav okkum sangin á føroyskum, partin av sangskrivingini, ið lýsti kenslur á føroyskum máli - tann partin vanvirða vit. Tey, sum góvu vanliga gerandisføroyinginum tónleikin á føroyskum, verða fullkomiliga vanvird og ella tagd burtur av etableraðu garduni av almennum føroyskum andspávum.

- Mær tykir, sum vit í dag skammast við hesa fólkaognina. Hon er ikki við á nakrari almennari játtan og verður ikki tikin fram til alment fyriskipað tiltøk. Tað, sum er vorðið fjøldini av Føroya fólki kærasta ognin, telir ikki sum mentan, skrivar Óla Jákup Rólantsson í Fregnum.

## Klika

Hann heldur, at alment stuðlaða mentanarlívið tykist alt meira klikut og tykist at vera reduserað til, at tey somu upp á skift geva hvørjum øðrum ummæli og virðislønir.

- Valdsapparatið innan føroyska mentan sær í løtuni út til at hava tendens til at dyrka merkverdigheitirnar. Grottukonsertir eru stórsta hittið í løtuni. Tá føroyska listaelitan fer til New York at lýsa føroyska list taka teir skilamannin Stamen Stanchev við at spæla "contemporary". Stamen skuldi heldur havt sín gamla bólk Chase við, og Edmund kundi sungið "Einki er sum fyrstu ferð"!

Óla Jákup Rólantsson heitir á nýggja formannin fyri Listastevnu Føroya um at sláa eitt slag fyri fólkamentanini.

# Side Effect spælir til techno-kvøld

**Fríggjakvøldið fer techno-bólkurin Side Effect at spæla á Margarinfabrikkini, har eisini diskotek er á skránni**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Margarinfabrikkin verður fríggjakvøldið karmur um eitt techno-kvøld, har bæði bæði livandi tónleikur og diskotek er á skránni.

Spennandi og lutvíst nýggi techno-bólkurin Side Effect fer at spæla fríggjakvøldið, og teir fara at bjóða nýmótans techno-tónleik.

Bólkurin gjørdi fyrr í ár vart við seg í undankappingini til Prix Føroyar, tá teir høvdu eina góða og øðrvísi framførslu á Strondum.

## Rúsfrítt

Hetta er triðja ferðin, at Side Effect spælir á Margarinfabrikkini, og undanfarnu konsertir hava verið væl vitjaðar.

Umframt Side Effect verður eisini diskotek á skránni.

Tiltakið í Margarinfabrikkini byrjar fríggjakvøldið kl. 22.00, og tað heldur fram til klokkan 02.00.

Í Margarinfabrikkini stremba tey eftir at hava eitt trygt og rúsfrítt umhvørvi, har børn og ung sleppa inn., og tað verður lovað, at tey, sum dáma techno-tónleik, fáa eitt gott kvøld.

# Týr í danskt studio at taka fløgu upp

**Um 10 dagar fer rockbólkurin Týr í studio í Keypmannahavn, har ein nýggj fløga skal takast upp**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*



*Týr fer nú undir upptøkurnar til eina fløgu. Upptøkurnar verða gjørdar í Keypmannahavn*

Nú fer Týr at gera álvara av at taka tónleik upp til eina fløguútgávu.

24. september fer føroyski rockbólkurin í eini upptøkuhøli í Keypmannahavn, og har skal bólkurin halda til í hálvanannan mánað.

Týr hava havt ársins hitt í Føroyum í ár. Teirra rockútseting av Orminum Langa hevur verið serstakliga væl dámd, og sangurin setti millum annað føroyskt met á hitlistanum hjá Útvarpinum.

- Í løtuni eru vit í holt við smálutirnar viðvíkjandi upptøkunum, so sum útseting av sangunum, fígging av upptøkuni og útgávuni, og annars venja vit sum vant, sigur Heri Joensen, gittarspælari í Týr.

## Hava roynt seg

Týr var í mai mánaði í donskum studio, tí danska plátufelaigð RecArt Music var áhuga í teimum. Tað spurdist einki meira burtur úr sambandinum millum Týr og RecArt, men Týr fekk royndir og eina góða demofløgu burturúr døgunum í PUK Studio.

Nú hevur bólkurin so gjørt avtalu við studio í danska høvuðsstaðnum, og teir ætla at dríva á næstu tíðina við at taka fløgu upp.

Um vikuskiftið fer Týr á palli í Føroyum. Teir fara at spæla á tveimum Free Føroyar konsertum, sum verða hildnar ávíkavist í Vági og í Havn.



**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi:**

**Hesir roknskapir fyri roknskaparárið 2000 eru innkomnir áðrenn 19. Juli 2001.**

| | | |
|---|---|---|
| 11.11 - 1994 | 490 Strendur | Sp/f 2433 |
| 18. November 1973 | 100 Tórshavn | Sp/f 219 |
| 23. Oktober 1997 | 485 Skálafjørður | Sp/f 754 |
| 28.juni 2000 | 520 Leirvík | Sp/f 3035 |
| 30. Oktober 97 | 100 Tórshavn | Sp/f 2686 |
| Á Bakka | 440 Haldórsvík | Sp/f 2896 |
| Á Grundini | 100 Tórshavn | P/F 1056 |
| AGA Føroyar | 100 Tórshavn | Sp/f 2612 |
| Akkuleya | 100 Tórshavn | Sp/f 1892 |
| Álaker | 100 Tórshavn | P/F 20 |
| Alfa Line | 530 Fuglafjørður | Sp/f 2831 |
| Alice T | 900 Vágur | Sp/f 2780 |
| Alilaks | 530 Fuglafjørður | P/F 1236 |
| Amerada Hess (Faroes) Ltd., filialur | 100 Tórshavn | 2766 |
| Anadarko Faroes Company Faroe Branch, filialur | 100 Tórshavn | 3095 |
| Atlantic Petroleum | 100 Tórshavn | P/F 2695 |
| Bakur | 497 Selatrað | P/F 758 |
| Bjørgvin | 490 Strendur | Sp/f 3013 |
| Bláfosslaks | 410 Kollafjørður | P/F 2593 |
| Boutique Good-Luck | 100 Tórshavn | Sp/f 355 |
| Branc of Phillips Petroleum, filialur | 100 Tórshavn | 3089 |
| Brøður Petersen | 530 Fuglafjørður | Sp/f 1047 |
| Bryggjubakki 2 | 100 Tórshavn | Sp/f 1957 |
| Byggimiðstøðin | 100 Tórshavn | Sp/f 217 |
| Byggiplan | 100 Tórshavn | Sp/f 2394 |
| Byggivirkið KBH | 650 Toftir | Sp/f 2912 |
| Bygningssnikkaravirkið BSV | 100 Tórshavn | P/F 791 |
| Carro | 360 Sandavágur | Sp/f 2776 |
| Chrom | 470 Eiði | Sp/f 2689 |
| D.J. Magnussen | 800 Tvøroyri | Sp/f 771 |
| Dagblaðið | 100 Tórshavn | Sp/f 2706 |
| Dalásmolt | 100 Tórshavn | P/F 2368 |
| Damco Trading Agency | 100 Tórshavn | P/F 365 |
| Danstein | 620 Runavík | P/F 1105 |
| Einars Prent | 100 Tórshavn | P/F 220 |
| El - Teknik | 520 Leirvík | Sp/f 1719 |
| Esmar Simonsen | 530 Fuglafjørður | P/F 349 |
| F.F. Bilaleiga | 100 Tórshavn | Sp/f 2866 |
| F.J.M. | 640 Rituvík | P/F 1064 |
| Faroe Smolt | 796 Húsar | P/F 2733 |
| Far-Tek | 350 Vestmanna | Sp/f 2618 |
| Fiskaklettur | 625 Glyvrar | Sp/f 2640 |
| Fjarhitafelagið | 100 Tórshavn | P/F 2363 |
| Flogfelag Føroya | 100 Tórshavn | P/F 1718 |
| Flogfelag Føroya Vágar | 380 Sørvágur | Sp/f 2598 |
| Fodan | 100 Tórshavn | P/F 2867 |
| Fonnco | 700 Klaksvík | Sp/f 1104 |
| Fonsdal | 350 Vestmanna | P/F 3024 |
| Formula.Fo | 100 Tórshavn | P/F 1062 |
| Føroya Dartsøla | 100 Tórshavn | Sp/f 2225 |
| Føroya Kolvetni | 100 Tórshavn | P/F 2688 |
| frá 13. Februar 1997 | 188 Hoyvík | P/F 2609 |
| Fuglø Arkitektar | 700 Klaksvík | Sp/f 2571 |
| Gratia | 700 Klaksvík | Sp/f 2982 |
| Grønanes | 350 Vestmanna | P/F 751 |
| Gróthagar | 650 Toftir | Sp/f 2197 |
| Grunnur H.N. Jacobsens | 100 Tórshavn | 2934 |
| Guldrangur | 530 Fuglafjørður | P/F 2627 |
| H.H. Trans | 100 Tórshavn | Sp/f 2278 |
| H.S. Hansen | 530 Fuglafjørður | Sp/f 2592 |
| H.V. Lützen | 100 Tórshavn | P/F 3032 |
| Handilsvirkið Niclasen | 380 Sørvágur | Sp/f 2401 |
| Handilsvirkið Prima | 100 Tórshavn | Sp/f 2578 |
| Hansa Maria | 650 Toftir | Sp/f 2759 |
| Hestprent | 100 Tórshavn | Sp/f 703 |
| Hjá Karl Jespersen | 800 Tvøroyri | Sp/f 403 |
| Høgni Jøkladal | 530 Fuglafjørður | Sp/f 1460 |
| Hølið | 100 Tórshavn | P/F 330 |
| Hólmalaks | 100 Tórshavn | P/F 2284 |
| Hotel Hafnia | 100 Tórshavn | P/F 1001 |
| Hovsá | 900 Vágur | P/F 2074 |
| Í Dalinum | 490 Strendur | Sp/f 147 |
| Ingi Zachariasen | 435 Streymnes | Sp/f 2886 |
| Innivist | 476 Gjógv | Sp/f 490 |
| Ísbjørnin | 100 Tórshavn | Sp/f 1381 |
| J.K. Joensen & Sonur | 370 Miðvágur | P/F 591 |
| J.M. Flutningur | 420 Hósvík | Sp/f 2559 |
| J.M. Joensen | 690 Oyndarfjørður | Sp/f 2388 |
| Jóhannes Haraldsen | 360 Sandavágur | Sp/f 1473 |
| John Poulsen | 385 Vatnoyrar | Sp/f 1124 |
| Jørgin Christiansen | 187 Hvítanes | P/F 1513 |
| K - heilsølan | 188 Hoyvík | Sp/f 2998 |
| Kaldbaks Seafood | 100 Tórshavn | P/F 2945 |
| Kári Johannesen Húsasmíð | 480 Skála | Sp/f 3025 |
| Kloosterboer Terminal Faroe Islands, Ltd. | 410 Kollafjørður | P/F 3005 |
| Kneysur | 750 Viðareiði | Sp/f 1346 |
| Kongshavnar Trolarafelag | 600 Saltangará | P/F 2359 |
| Kósin | 700 Klaksvík | P/F 2229 |
| Krossbrekka | 513 Syðrugøta | P/F 2039 |
| La Carreta | 350 Vestmanna | Sp/f 1642 |
| Laksaaling | 440 Haldarsvík | P/F 2243 |
| Laksafóður | 410 Kollafjørður | Sp/f 2111 |
| Langasker | 100 Tórshavn | Sp/f 2165 |
| Laxá | 695 Hellur | P/F 616 |
| Leitið | 750 Viðareiði | Sp/f 2576 |
| Lógv | 600 Saltangará | Sp/f 76 |
| Lómur | 600 Saltangará | Sp/f 2633 |
| M.J. International Sale | 100 Tórshavn | Sp/f 3047 |
| M.J. Saltsøla | 100 Tórshavn | P/F 2114 |
| Marita Weihe | 100 Tórshavn | Sp/f 2032 |
| Marius Joensen | 477 Funningsfjørður | Sp/f 610 |
| Mark | 100 Tórshavn | P/F 2462 |
| Marr & Co. | 100 Tórshavn | P/F 12 |
| Metal | 640 Rituvík | Sp/f 2626 |
| Morning Star | 490 Strendur | Sp/f 714 |
| Múlavík | 470 Eiði | P/F 2291 |
| Navir | 340 Kvívík | P/F 2252 |
| Niels C. Sørensen | 160 Argir | Sp/f 1588 |
| Niels Finsensgøta 23 | 100 Tórshavn | P/F 225 |
| Norð Trukk | 100 Tórshavn | Sp/f 974 |
| Norðaling | 690 Oyndarfjørður | P/F 1296 |
| Norðex | 690 Oyndarfjørður | Sp/f 2460 |
| Norði | 650 Toftir | Sp/f 1816 |
| Nordic Bulk | 100 Tórshavn | Sp/f 2124 |
| Nordic Frost | 100 Tórshavn | Sp/f 2228 |
| North Atlantic Invest | 100 Tórshavn | Sp/f 1128 |
| Ólivant | 785 Haraldssund | P/F 340 |
| Oliver Øster | 470 Eiði | Sp/f 795 |
| Opportuna | 100 Tórshavn | Sp/f 2387 |
| Orto Service | 430 Hvalvík | Sp/f 2812 |
| Páll Joensen | 416 Signabøur | Sp/f 1299 |
| Petersen & Guttesen | 100 Tórshavn | P/F 590 |
| Petur & Petur | 100 Tórshavn | P/F 2828 |
| Polyplast | 100 Tórshavn | P/F 705 |
| Profilax | 100 Tórshavn | Sp/f 2501 |
| Pure Water | 700 Klaksvík | Sp/f 2331 |
| Radioservice | 100 Tórshavn | Sp/f 2024 |
| Randi B. Mohr | 100 Tórshavn | Sp/f 3004 |
| Rávan | 380 Sørvágur | P/f 2381 |
| Rederiet Peter Rohde Thorshavn | 100 Tórshavn | Sp/f 2499 |
| Roknskap AK | 750 Viðareiði | Sp/f 190 |
| Rundingur | 100 Tórshavn | P/F 47 |
| S.G. Asfalt | 100 Tórshavn | Sp/f 3045 |
| Sálarbótsá | 370 Miðvágur | P/F 2268 |
| Salmex | 410 Kollafjørður | P/F 2594 |
| Sam | 100 Tórshavn | Sp/f 2772 |
| Samvinnufelagið | 360 Sandavágur | P/F 28 |
| Sandavágs Bilverkstaður | 360 Sandavágur | Sp/f 2129 |
| Sansir | 100 Tórshavn | P/F 2599 |
| Saturn Fisk | 900 Vágur | Sp/f 2573 |
| Seglhúsið | 350 Vestmanna | Sp/f 1500 |
| Sertannlæknastovan Bergtóra Hausardóttir | 100 Tórshavn | Sp/f 2256 |
| Sílaaling Hvalvík | 430 Hvalvík | P/F 2244 |
| Skilling | 100 Tórshavn | Sp/f 2788 |
| Skretting Føroya | 430 Hvalvík | Sp/f 1857 |
| Stiðjafjall | 178 Norðradalur | Sp/f 819 |
| Suðurlaks | 900 Vágur | Sp/f 2507 |
| Suðuroyar Bókhaldsvirki | 950 Porkeri | Sp/f 64 |
| Svanur | 900 Vágur | Sp/f 1434 |
| Sveipur | 160 Argir | P/F 1203 |
| Teldutænastan | 100 Tórshavn | Sp/f 2177 |
| Telefonverkið | 100 Tórshavn | P/F 2697 |
| TF Holdings | 100 Tórshavn | P/F 2941 |
| Thorshavns Mælkeforsyning & Margarinefabrik | 100 Tórshavn | P/F 4 |
| Tonito | 470 Eiði | Sp/f 1112 |
| Tór Data í likvidatión | 100 Tórshavn | P/F 1784 |
| Træsmiðjan GLT | 100 Tórshavn | Sp/f 1890 |
| Trygd | 100 Tórshavn | P/F 8 |
| Tukan | 100 Tórshavn | Sp/f 2930 |
| Valdemar Lützen | 100 Tórshavn | P/F 38 |
| Varðin | 510 Gøta | P/F 931 |
| Veba Oil & Gas Faroes Branch | 100 Tórshavn | 3088 |
| Vestfelli | 410 Kollafjørður | P/F 2535 |
| Vestlax | 350 Vestmanna | P/F 1008 |
| Vestmanna Timburhandil | 350 Vestmanna | P/F 162 |
| Vestsalmon | 410 Kollafjørður | P/F 1774 |
| Vestsmolt | 350 Vestmanna | P/F 2110 |
| Vesturvón | 380 Sørvágur | P/F 67 |
| Virkisráðgeving | 600 Saltangará | Sp/f 2620 |
| Vita Margarin | 100 Tórshavn | P/F 1885 |
| VS Seafood | 380 Sørvágur | P/F 2601 |
| West Trading | 160 Argir | Sp/f 2233 |


Landsfundurin hjá Javnaðarflokkinum

verður í Skúlaauluni í Vestmanna

Fríggjadagin 14. september
kl. 19.00 1. Formaðurin býður vælkomin
2. Mentanartiltak – sangur – tónleikur – upplestur
3. Góðkenning av fundarskipan
4. Val av fólki til fundarskipan
5. Frágreiðing skrivarans
6. Orðaskifti um frágreiðingina
7. Frágreiðing frá feløgunum

Leygardagin 15. september
kl. 09.00 1. Formansfrágreiðing
2. Orðaskifti um frágreiðingina/ Politiskt orðaskifti
kl. 12.00 *Matarsteðgur*
kl. 13.00 *Orðaskiftið heldur fram*
kl. 15.00 *Góðkenning av*
1. valskrá
2. virkisskrá
*val av*
1. starvsnevnd
2. floksleiðslu
3. ásetan av limagjaldi
kl. 16.00 *Landsfundarsamtykt*
*Ymiskt*

Javnaðarflokkurin

Ford Focus Ghia
- Motorur 1,600
- Fra december 1998
- ikki roykjarabilur



Kostnaður kr 125.000

Ring tlf 223369